Jørgen Niclasen
Jacob Vestergaard
Bárður á Lakjuni
Árni Skaale
Beinir Johannesen
løgtingsfólk

Broytingaruppskot I

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 3 verður orðað soleiðis:
   "**§ 3**. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í ferðavinnuætlanum sbrt. § 6 í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, í øðrum løgtingslógum og lógum, kunnu ferðafólk ferðast til gongu undir egnari ábyrgd á útvaldum bygdagøtum. Kommunan tekur avgerð um, hvørjum bygdagøtum gangast kann eftir.
   Stk. 2. Fyri atgongd til ávíst øki kann bóndin krevja eitt gjald."

2. § 4, stk. 1, verður orðað soleiðis:
   "Øll, sum ferðast ella uppihalda sær á útvaldum bygdagøtum, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru náttúru, fenaði, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa."

Viðmerkingar
Ásetingarnar í § 3 eiga at koma í eina ferðavinnuætlan, sum kommunan ger í semju við bóndan. Eisini eigur at verða ásett, at bóndin kann taka gjald.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1
Við broytingini kunnu ferðafólk einans ferðast undir egnari ábyrgd á útvaldum bygdagøtum og ikki uttangarðs og fram við strondini. Tað er kommunan, sum tekur avgerð um, hvørjar bygdagøtur eru útvaldar.

Við broytingini í § 3, stk. 2 fær bóndin heimild at krevja gjald fyri atgongd til ávíst øki.

Ad. 2
Konsekvensbroyting av tí at § 3 verður broytt.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jørgen Niclasen Jacob Vestergaard Bárður á Lakjuni

Árni Skaale Beinir Johannesen